# Eiðis kommuna

## SKRIVSTOVUFÓLK

**Søkt verður eftir skrivstovufólki at byrja skjótast til ber**

**Høvuðsarbeiðsuppgávur:**
- Planleggja, raðfersta og samskipa arbeiðisuppgávurnar á skrivstovuni
- Tryggja dagligu arbeiðisgongdirnar
- Tryggja eitt gott samskifti við borgarar og viðskiftafólk
- Fyrireika bygdarráðsfundir saman við borgarstjóranum
- Dagføring av heimasíðu
- Aðrar fyrisitingarligar uppgávur

**Førleikakrøv:**
Útbúgving:
- Relevanta útbúgvin innan skrivstovuøkið, fyrisiting ella líknandi førleika

EDV: Kunnleika til m.a. hesi forrit:
- Journalskipan
- Tekstviðgerð
- Rokniark
- Kalendara- og t-postskipan

**Royndir:**
Ynskiligt er at viðkomandi hevur innan fyrisiting og skrivsstovuhald

**Annað:**
Viðkomandi, ið settur verður, hevur tagnarskyldu viðvíkjandi viðurskiftum, ið kunnleiki fæst til gjøgnum starvið, eisini aftaná, at viðkomandi er farin úr starvi.

**Persónligar eginleikar:**
Skal m.a:
- Vera virkisfús/ur og framsøkin
- Síggja trupulleikar sum uppgávur og ikki sum forðingar
- Hava góðar menniskjaligar og fakligar eginleikar
- Kunnu virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og eggja teimum at menna tænastustøðið
- Vera trúgv/ur móti tiknum avgerðum

**Arbeiðstíð:**
Arbeiðstíðin er 30 tímar um vikuna

**Løn:**
Starvið verður lønt samb. sáttmála við avvarðandi yrkisfelag

**Umsóknarfreist:**

Umsóknir v.m. skulu sendast til:

Eiðis Kommuna
Brekkuvegur 22
Att: Borgarstjórin
FO-470 Eiði

Og skulu vera Eiðis kommunu í hendi, í seinasta lagi mánadagin 30 mars. 2009 kl. 16.00

Meiri fæst at vita um starvið við at seta tykkum í samband við Rólant Poulsen, borgarstjóra, á tlf: 213312

**Eiðis kommuna**
Brekkuvegur 22
470 Eiði

---

# Hárfríðkari til Tjarnargarð



Við hesum verður biðið um tilboð frá áhugaðum hárfríðkarum til hárviðgerð á Tjarnargarði.

Tilboðið skal vera útgreinað viðvíkjandi ymisku hárviðgerðunum við atliti til, at Tjarnargarður rindar alt tilfar.

Arbeiðsdagar og -tíðir verða sambært avtalu og í samstarvi við starvsfólkið á eindunum.

Á Tjarnargaði búgva 34 fólk, og krøvini til umsøkjararnar eru áhugi innan eldraøkið og góð samstarvsevni.

Tilboðsfreist 30. apríl 2009.

**Tilboðini skulu sendast til:**
Tórshavnar Kommunu
postboks 32,
110 Tórshavn

Merkið brævbjálvan »Tilboð sum hárfríðkari«.

**Tórshavnar kommuna**

---

Sankta Frans skúli
Varðagøta 10
FO 100 Tórshavn
Tlf. 302530 ella 302532

## Innskriving av næmingum til forskúlan í Sankta Frans skúla skúlaárið 2009/10

Foreldur, ið ætla at skriva børn síni inn í forskúlan í Sankta Frans skúla skúlaárið 2009/10 eiga at boða skúlanum frá í seinasta lagi 20. mars 2009.

Arbeiðið í forskúlanum skiftir millum læring, mennandi spøl og kreativt virksemi. Dentur verður lagdur á at geva børnunum góðar upplivingar, og at tey læra at samstarva og hava virðing hvørt fyri øðrum.

**Endamálið er m.a.**
- At fyrireika barnið til at fara í skúla
- At menna barnið málsliga
- At geva barninum góðar upplivingar við leiki og skapandi virksemi
- At barnið lærir ymsar arbeiðshættir og at arbeiða í frið og náðum
- At barnið mennist samsvarandi teimum evnum, tann einstaki hevur
- At virka fyri góðum samstarvi millum skúla og heim
- At barnið fær undirvísing í lesing, skriving og rokning á byrjunarstøði

Setið tykkum í samband við skúlan á tlf. 302530 ella í teldubrævi til fra@skulin.fo

Um barnið skal í frítíðarskúla, kunnu tit venda tykkum til Snarskivuna ella ringja tlf. 302010

**Sankta Frans skúla**
Varðagøta 10
100 Tórshavn

---

**Suðuroyar Sjúkrahús**
FO-800 Tvøroyri
Tlf: 34 33 00 · Fax: 37 11 42
ssh@ssh.fo · www.ssh.fo

## Endurlýsing eftir frítíðaravloysarum fyri portørar

Søkt verður eftir frítíðaravloysarum fyri portørar frá 1. juni til 31. august 2009.

Portørdeildin er ein deild við nógvum ymiskum uppgávum m.a. bráðfangishjálp í samband við lívbjargandi arbeiði, flutning av sjúkum og skaddum fólkum. Eisini hevur portørdeildin ábyrgd av øllum portørarbeiði á sjúkrahúsinum, og setir hetta stór krøv til starvsfólk, ið mangan arbeiða undir serliga strongdum umstøðum.

Tann, ið settur verður kemur at arbeiða í skiftandi vaktum við tilkallivakt frá heiminum. Neyðug upplæring verður givin á sjúkrahúsinum.

Løn og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Havnar Arbeiðsmannafelag.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til Birgir Dimon telefon 34 33 00 lokal 3230.

Umsóknir skulu sendast til:

Suðuroyar Sjúkrahús
att. umsjónarmaðurin
Sjúkrahúsbrekkan 19
800 Tvøroyri

ella

ssh@ssh.fo

Umsóknarfreist: 28. mars 2009